# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Sjálvandi er mann ongantíð nøgdur við at tapa, men vit skaptu altso fleiri møguleikar enn B36. So saman um tikið kann sigast, at teir skora upp á sínar møguleikar, og tað gera vit ikki.*

*Eli Hentze, venjari hjá B71*



*17 ára gamli Oddmar Færø fekk debut á B36-liðnum í gjárkvøldið, og hetta er triðja ættarlið við sama navni, ið leikar fyri árstalsfelagið í Havn*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Haldi tað gekk væl

Sigur tú navnið Oddmar Færø, so sigur tú næstan samstundis B36. Og tann, sum ikki visti betur, tá hann rann gjøgnum leikararnar í B36-hópinum í leikskránni, kundi stúrsa við, tá teir sóu hetta navnið.

Hvat ólukkan hava teir grivið fram aftur, mundi onkur helst hugsa.

Tað hava teir nú ikki. Tí talan er heilt einfalt um triðja ættarlið av B36-leikarum við sama navni. Hetta yngsta skotið á stammuni er 17 ára gamal, og fekk sín landskappingardebut í dystinum móti B71.

- Jú, eg haldi tað gekk bara væl. Tað var deiligt at sleppa at spæla fyrsta landskappingardystin, segði Oddmar Færø, tá vit fingu orðið á hann eftir dystin.

Hann og restin av familjuni hava annars búð í Aberdeen í Skotlandi í 14 ár, so hann hevur bert verið trý ára gamal, tá hann flutti úr Føroyum. Oddmar hevur sjálvandi leikt fótbólt í Skotlandi, við einum lokalum felag, sum nevnist Keith FC. Hann hevur leikt í yngru deildunum, men hevði fingið sáttmála við felagið um at leika við bestu liðnum, og var fyribils komin á eykaliðið, nú tey fluttu heim til Føroya fyri tveimum mánaðum síðani.

Hann var ikki í iva, tá vit fregnaðust um tað var trupult at velja felag.

- Nei, har var eingin ivi. Tað var B36, um teir altso vildu geva mær møguleikan, segði Oddmar Færø.

Møguleikan hevur Oddmar nú eisini fingið, so fyribils gleðir hann seg bara til at sleppa at spæla við barndómsfelagnum hjá pápanum og abbanum.

## Teir skora vit brenna

So einfalt tók Eli Hentze saman um, tá vit spurdu hann um hansara meting av dystinum móti B36

- Vit skapa einar fýrafimm stórar møguleikar móti einum oddaliði á útivølli, millum annað við skoti á tvørtræið, og tað má mann sjálvandi vera nøgdur við, segði Eli.

Hann segði, at teir alla tíðina máttu hava eygað við Sylla, tí hann er bæði skjótur og sterkur, men Eli helt eisini, at B71-spælið var í lagi.

- Sjálvandi er mann ongantíð nøgdur við at tapa, men vit skaptu altso fleiri møguleikar enn B36. So saman um tikið kann sigast, at teir skora upp á sínar møguleikar, og tað gera vit ikki.

**(-leo)**

# Spurningur um (mis)nýttar møguleikar



*Sylla var ein týðandi leikari fyri B36 í gjárkvøldið, tá hann skoraði til bæði 2-0 og 3-0. Hann misnýtti tó møguleikan at fáa hattrick, tá hann seint í dystinum brendi eitt brotsspark*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í stuttum kann sigast, at Jákup Mikkelsen – og í einum føri tvørtræið – tryggjaði B36 sigurin í Gundadali í gjárkvøldið. Tí hóast heimaliðið hevði yvirvág í leikbýti, so hevði B71 greiða yvirvág í málmøguleikum**

FÓTBÓLTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

B36

B71

Á pappírinum lá tað til ein ein rímiliga tryggan heimasigur, tá B36 og B71 hittust í Gundadali í gjárkvøldið. Og soleiðis endaði tað eisini, men tað er ikki øll søgan.

Tí skal gangast eftir málmøguleikunum, so hevði ein greiður sigur til gestirnar ikki verið óuppiborin. Men tí forðaði Jákup Mikkelsen fyri.

Tað var B71, sum legði best frá landi. Teir sýndu fyrstu 10-15 minuttirnar bæði gott og kvikt kombinatiónsspæl, har alt eydnaðist. Driblingar, samanspæl og møguleikaskapandi avlevaringar. Tað fyrst nevnda var tó nakað, ið kanska var betri ógjørt.

Longu í fyrsta minutti slapp ein vælleikandi Símin Hansen ígjøgnum, og hvussu Jákup Mikkelsen fekk beinið á skotið, veit helst bara hann sjálvur.

B36 lærdi ikki av hesum hvøkkinum, tí longu tveir minuttir seinni slapp hin stórleikarin hjá B71 í hesum dystinum, Clayton Soares, ígjøgnum í høgru síðu, men eisini hesaferð bjargaði Jákup meistarliga drønskotinum frá B71-leikaranum.

Eftir hetta tóktist B36 rakna við og skilja, at B71 meinti tað í álvara, og verjan fekk nógv betri tak á næsku gestunum. Og so líðandi yvirtók B36 spælið, og hendan yvirvág helt sær mest sum allan dystin ígjøgnum.

### Næskir við horna

Sum nevnt hevði B36 truppulleikar við at skapa giftigar málmøguleikar, men teir vóru tó næskir við hornaspørk. Við eitt av hesum fekk Ingi Højsted høvdið á, men bólturin streyk framvið málinum.

Men tá 25 minuttir vóru farnir, bar til hjá heimaliðnum. Og tað var eisini eftir horna, at Klæmint Matras var fremstur á bóltinum og sneiddi hann hegnisliga í netið við høvdinum.

Leikliga gongdin helt fram, men B71 broytti spælið soleiðis, at í staðin fyri kvikt og framrættað uppspæl, dribladu summir leikarar alt ov nógv. Hetta førdi til nogvar flottar detaljur, men gekk samstundis út yvir effektivitetin. Og tað førdi so aftur við sær, at B71 ikki gjørdist vandamikið aftur, fyrr enn í seinna hálvleiki.

Hinvegin fekk Sylla ein gyltan møguleika í yvirtíðini av fyrra hálvleiki, men hann lyfti headaran upp um eitt annars nærum tómt mál.

Tá seinni hálvleikur byrjaði, skuldi ein trúa, at B36 hevði byrjanina av dystinum í huga, men so var ikki. Tí seinni hálvleikur byrjaði júst á sama hátt, sum fyrri – við tveimum risa møguleikum til gestirnar.

Longu í 2. minutti setti B71 eitt skjótálop í gongd – teirra besta í øllum dystinum – og tað endaði við at ein meiri ella minni fríur Wellington hamraði bóltin undir tvørtræið, sum síðani brast í vøllin framman fyri Jákupi. Og so var tann vandin av fyri heimaliðið. Løtu seinni gjørdist Flavio Santana leysur, men Jákup Mikkelsen hevði sína triðju meistarligu bjarging.

Nú strammaði B36-verjan aftur takið, og burtursæð frá einum nærgangandi headara frá Clayton Soares mitt í hálvleikinum, gjørdist B71 ikki av álvara vandamikið aftur í dystinum.

Tað gjørdist B36 hinvegin, og tíggju minuttir inn í hálvleikin trekti Heini í Skorini tvørs av vøllinum, leikti innskifta Berg Midjord leysan í høgru síðu, og hansara innlegg beindi Sylla vakurt inn við stongini við høvdinum. 2-0.

### Fleiri ferðir nær við

Ransin Djurhuus dømdi ein góðan dyst, men í einum føri stóðu áskoðararnir púra býttir, og tað var tá Sylla inni í brotsteiginum hamr-